# Bilar

Nr. 244 • hósdagur • 19. desember 2002 • 76. árg.



*Mazda Tribute innan. Tribute er sami bilur sum Ford maverick*



*Mazda Tribute. Jákup Jacobsen, sølumaður hjá Berg Motors, sýnir her amerikanska Mazda jeepin fram*

# Tribute – amerikanskur Mazda jeepur



*Rúturin í baklúkuni kann latast upp fyri seg*

**Hóast Mazda gera nógv ymisk sløg av bilum, er hetta fyrstu ferð at teir koma á marknaðin við einum "off-raodara". Mazda Tribute er ein frítíðar bilur sum er gjørdur í samstarvi við Ford.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eins og nógvir aðrir jeepar í hesum klassanum er Mazda Tribute fyrst og fremst gjørdur til at koyra á asfalti, hóast hann klárar seg væl á ósløttum undirlendi. Vanliga trekkjur bilurin við forhjólunum, men ein viskosekobling millum akslarnar ger at bakhjólini hjálpa til tá brúk er fyri tí. Ein knøttur á instrumentborðinum er til at sperra differentialið við. Bilurin fæst við tveimum bensinmotorum: Einum 2,0 litur motori við 124 hk og einum 3,0 litur við 197 hk. Tribute verður gjørdur í USA og er sami bilur sum Ford Maverick. Ford hevur tríggjar størri "off-roadarar", teir eru Explorer, Expedition og Excursion.

Teir Mazda Tribute sum eru komnir hendanvegin hava 2,0 litur motorin við 124 hk. Bilurin fæst sum fimmpersóna bilur og sum vøruvognur. Sum vøruvognur er lastarúmið 1830 litrar. Rúturin í baklúkuni kann latast upp fyri seg, soleiðis at ikki er neyðugt at lata alla lúkuna upp fyri at legga smærri lutir inn í bilin. Airbag eru framman og í síðunum. Tribute er í sama klassa sum Toyota RAV4, Honda C-RV og Land-Rover Freelander. Bilurin er væl útgjørdur við el-síðurútum, el-síðuspeglum, fart-piloti, hita í forsetrunum, alufelgum og tokulyktum í kúfangaranum framman.

## Mazda Tribute 2,0i 4x4

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl.16V bensin við 124 hk |
| 0-100 km/t | 13,0 sek |
| Bensinnýtsla | 9,4 km/l |
| Dekkstødd | 215/70-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 442,0 cm |
| Breidd | 180,0 cm |
| Hædd | 177,0 cm |
| Eginvekt | 1475 kg |
| Viðførisrúm | 935 litrar |
| Prísur | kr. 288.000 (persónbilur)<br>kr. 215.700 (vøruvognur) |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur 1-3<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel 313535 |



# Seinasti postflutningur sjóvegis um Vestmannasund



*Jóhan Pauli Hammer, bilførari hjá Postverkinum, koyrdi postbilin, tá posturin fyri seinast ferð bleiv fluttur sjóvegis um Vestmannasund*

**Eftir at postur hevur verið fluttur sjóvegis um Vestmannasund í yvir hundrað ár, fór seinasti postbilurin við Ternuni seinasta túrin av Oyragjógv týsdagin 10. desember. Jóan Pauli Hammer bilførari hjá Postverkinum koyrdi postbilin hendan dagin**

POSTFLUTNINGUR
*Magnus Gunnarsson*

Sjóvegis postflutningur um Vestmannasund fór í søguna týsdagin 10. desember. Fyrstu tíðina bleiv posturin førdur við opnum róðrarbáti av Válinum yvir á Oyragjógv. Seinni bleiv siglt á Fútaklett. Frá umleið 1920 førdi deksbáturin "Helgi" postin um sundið. Deksbáturin "Ólavur" røkti hesa sigling 1930 til 1965, tá Bragd kom at sigla um Vestmannasund. Síðan 1969 hava SAM og Ternan røkt hesa sigling. Posturin bleiv handaður umborð á bátarnar til bilferjurnar komu. Síðan tá hava postbilarnir úr Havn koyrt til bygdirnar í Vágum og á flogvøllin við og eftir posti.

# Føroya Shell hevur sín egna ferðslutrygdarpolitikk (defensiv koyring)

**Ferðslutrygdarpolitikkurin hjá Shell um allan heimin gongur út uppá, at øll teirra starvfólk skulu á ferðslutrygdarskeið. Koyrilærararnir Bjarki Johannesen og Niels Peter Olsen halda hesi skeið fyri Føroya Shell**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*



*Koyrilærararnir Bjarki Johannesen og Niels Peter Olsen halda ferðslutrygdarskeiðini fyri Føroya Shell. Umboð fyri aðrar fyritøkur eru vælkomin at kontakta teir, um tey ynskja, at teir skulu halda ferðslutrygdarskeið fyri teirra starvsfólkum, siga Bjarki og Niels Peter*

"Bilførari eigur at hava í huga, at positiv framferð í ferðsluni er við til at styrkja um tað umdømi, sum fyritøka okkara hevur og livir av". Hetta er brot úr ferðslutygdarpolitikkinum hjá Føroya Shell.

Tað er eitt krav frá Shell at øll teirra starvsfólk, um tey koyra í tangabili, lastbili, servicebili ella privatbili, skulu á ferðslutrygdarskeið. Ístaðin fyri at senda øll síni starvsfólk av landinum gjørdi Føroya Shell avtalu við koyrilærararnar Bjarka Johannesen og Niels Peter Olsen um at halda hesi skeið fyri teirra starvsfólkum. Teir blivu sendir til Danmarkar á ferðslutrygdarskeið. Síðan hava teir hildi skeið fyri starvsfólkunum hjá Føroya Shell. Teir hava tillaga skeiðini til føroysk viðurskiftir.

Dentur verður lagdur á at koyra "defensivt", t.v.s. at halda rætta frástøðu til aðrar bilar, so bilførarin í góðari tíð kann síggja hvat er fyri framman og harvið varnast møguligar vandar í ferðsluni. Tað eigur altíð at verða koyrt eftir umstøðunum og allar ásetingar í ferðsluni skulu haldast

Á hesum skeiðum verður vitjað á Ferðslutrygd har luttakararnir m.a sleppa at royna "Hvølvus" og sletuna við trygdarbeltunum. Ein videofilmur verður vístur, sum sýnir hví tað er so neyðugt at nýta trygdarbeltir. Skeiðið endar við myrkakoyring inni á Sundi. Skeiðluttakararnir vóru skelkaðir, tá teir sóðu, hvussu hættisligt tað er at ganga í myrkum klæðum í myrkri uttan endurskin.

Um allan heimin hevur ferðslutrygdarpolitikkurin hjá Shell havt góða ávirkan, við tað at tær álvarsligu deyðsvanlukkurnar eru blivnar færri. Skeiðluttakararnir fáa nakað at hugsa um og blíva meira tilvitaðir um ferðsluna.